# Landsroyndin 2009

- *frágreiðing um mál, ávegis mál, uppgávur og úrslit*

**Mentamálaráðið** **September 2009**

# Landsroyndin í 2009

## Almennar viðmerkingar

Sambært § 14, Stk. 5 í løgtingslóg um fólkaskúlan skipar landsstýrismaðurin, eftir nærri ásettum reglum, fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúrulærugreinunum á 4. og 6. floks stigi. Landsroyndirnar skulu saman við støðuroyndum vera ein liður í arbeiði skúlans at eftirmeta undirvísingina. Í lógini er eisini ásett, at foreldrini skulu verða kunnað um úrslitini av lands-og støðuroyndum.

## Endamál

Endamálið við lands-og støðuroyndunum er at tryggja skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í fakliga støðið í fólkaskúlanum, og at geva lærarum og skúlaleiðslu eitt amboð, sum, umframt at meta um fakliga støðið hjá næmingunum, eisini skal nýtast til at laga og málrætta undirvísingina til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum. Eisini er málið við lands-og støðuroyndum at styrkja eftirmetingar-skipanina í skúlunum.

Harumframt eru landsroyndirnar ætlaðar sum amboð og ítøkiligt grundarlag hjá myndugleikum, skúlum og foreldrum at fylgja við og meta um fakliga støðið í teirra egna skúla, umframt at kunna viðgera úrslitið í mun til fakliga støðið í øðrum skúlum í landinum.

## Landsroyndin í 2008 og 2009

Fyrsta landsroyndin á hesum sinni varð framd í 2008. Málini eru tey somu í 2009 sum í 2008. Men við støði í eftirmetingini av landsroyndini í 2008 eru gjørdar ávísar broytingar og tillagingar í sjálvum royndunum í 2009. Eitt nú er tíðin í royndini í føroyskum longd, tá tað snýr seg um mállærupartin. Tíðin í royndini í føroyskum at lesa og skilja tekst er harafturímóti stytt, tí tíðin gevur ábendingar um sjálvan lesiførleikan. Eisini eru uppgávurnar í at lesa og skilja endurskoðaðar, soleiðis at betur kann metast um førleikan at lesa og førleikan at skilja tekstin. Í landsroyndini í 2009 verður tað sostatt meira sjónligt, hvussu væl næmingarnir fata tað, teir lesa.

Hetta eru nøkur viðurskifti, sum vit eiga at hava í huga, tá ið mett verður um royndarúrslitini í teimum ymsu lærugreinunum, og serliga tá samanborið verður millum landsroyndirnar í 2008 og í 2009.

Uppgávurnar til landsroyndina eru gjørdar við støði í *ávegis málum* fyri lærugreinirnar í 4. og 6. flokki. Til landsroyndina í 2008 vóru málini ikki kunngjørd skúlunum fyrrenn knappar tveir mánaðir framman undan landsroyndini, og mett verður, at hetta hevur havt ávirkan á úrslitið í 2008. Haraftrat kann tað eisini hugsast, at tað í 2008 vóru næmingar og lærarar, sum ikki vóru vanir við hendan royndarháttin, og kann hetta eisini hava havt ávirkan á úrslitið í 2008. Til landsroyndina í 2009 hava næmingar og lærarar havt høvi til at kunna seg betur við ásettu málini og kravdu landsroyndina. Herumframt hava bæði næmingar og lærarar í landsroyndini í 2009 havt royndirnar frá landsroyndini 2008 at stiðja seg til. Landsroyndirnar og -úrslitini frá 2008 eru eftirmett og ávísar tillagingar eru, sum sagt omanfyri, gjørdar. Ein beinleiðis samanbering millum landsroyndina í 2008 og 2009 eigur tí at gerast við fyrivarni. Staðfestast má eisini, at vit støðugt eru í eini tilgongd, tá hugsað verður um at finna hóskandi royndarhættir og torleikastig til ymsu floksstigini.

## Úrslit

Tað er framvegis umráðandi at hava í huga, at slíkar royndir sum hendan siga ikki alt um førleika næminganna, langt frá tí, men royndirnar kunnu tó geva okkum eina ábending um, hvussu støðan er. Hetta kann so nýtast sum grundarlag undir tiltøkum til tess at betra um úrtøku næminganna í lærugreinunum.

Uppgávurnar at lesa og skilja við styttri tíð og fleiri lesifatanaruppgávum bæði hjá 4. og 6. flokki eru meira krevjandi í landsroyndini 2009 í mun til 2008. Og kortini tykjast flestu næmingar, bæði í 4. og 6. flokki, sum heild at klára royndina í 2009 at lesa og skilja betur enn næmingarnir í 2008 gjørdu.

Í landsroynini í 2008 broyttist lesiførleikin ikki stórvegis frá 4. til 6. flokk. Í landsroyndini í 2009 eru tó munandi fleiri næmingar í 6. flokki, sum betur megna royndirnar at lesa og skilja / fata enn í 2008. Eisini er stórur munur í royndini í mállæru, har næmingarnir í 6. flokki í 2009 klára royndirnar munandi betur enn í 2008.

Næmingar í 4. flokki megna somuleiðis sum heild uppgávurnar at lesa og skilja nakað betur enn í 2008. Tey megna betur tann partin av lesingartilgongdini, sum snýr seg um avkoding, har skrivaða súmbolið (bókstavir) verður umsett til ljóð (orð og setningar).

Uppgávurnar í 2009 í fyrisøgn eru ikki so nógv broyttar í mun til í 2008, og samanberingin er tí kanska lættari. Næmingarnir í 6. flokki megna sum heild uppgávurnar í fyrisøgn nakað betur í landsroyndini 2009 enn í landsroyndini í 2008. Næmingarnir í 4. flokki eru meira javnir í 2009 enn í 2008.

Eisini í støddfrøði hava næmingarnir bæði í 4. og 6. flokki klárað uppgávurnar í landsroydnini í 2009 væl og eisini betur enn í 2008. Serliga í 6. flokki sæst ein stór framgongd.

Lærugreinin náttúru og tøkni er meira enn aðrar lærugreinir ein ’upplivingarlærugrein’, t.e. næmingurin í størri mun fer út í náttúruna í verki at læra og kanna umstøðurnar. Tí kann tað vera trupulari at seta upp vanligar royndir. Hóast hetta, so vísir landsroyndin í 2009, at næmingarnir bæði í 4. og í 6. flokki hava klárað uppgávurnar í náttúru og tøkni væl og enntá munandi betur enn í landsroyndini í 2008.

Niðanfyri verður greitt frá málum, uppgávum og úrslitum í einstøku lærugreinunum. Næsta skúlaár, t.e. 2010/2011 verða førleikamálini á ymsu floksstigunum gjørd av nýggjum. Hetta fer sjálvsagt at ávirka uppgávurnar til landsroyndirnar á vári í 2011, men fer ikki at hava ávirkan á komandi landsroyndir í 2010.

# Føroyskt

## Endamálið fyri lærugreinina

Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin fær tokka til móðurmálið
- at næmingurin fær áhuga og virðing fyri móðurmálinum
- at næmingurin lærir, at móðurmálið er samskiftismiðil millum menniskju
- at næmingurin lærir at málbera seg væl og vakurt
- at næmingurin lærir at lurta og lesa, so hann verður førur fyri at fata og sjálvur nýta ein beinraknan og skiftandi málburð
- at næmingurin lærir at skriva føroyskt málsliga og stavsetingarliga rætt og við rættari teknseting
- at undirvísingin er skipað soleiðis, at næmingurin fær stimbrað lesingina og ognað sær tey virði, sum eru í skaldskapi.

### Ávegis mál í 4. flokki

Undirvísingin í 1.-3. flokki skal miða ímóti, at næmingurin stig fyri stig fær ognað sær kunnleika og fimi, sum ger hann føran fyri:

- at lesa og skriva sítt egna navn
- at kenna lesirætningin (at lisið verður frá vinstru til høgru og úr erva og niðureftir, og at næmingurin dugir at skifta reglu)
- at skilja, at til hvønn bókstavin knýta seg ljóð
- at kenna ávísar orðamyndir
- at brúka tey orðini, hann kennir, til at gitalesa nýggj orð
- at brúka bókstavirnar til at lesa orð, t.d. kann fyrsti bókstavurin í orðinum geva eina ábending um, hvat orðið er
- at lesa lættan tekst við kendum innihaldi – skilja einføld skrivlig boð
- at lesa og skriva í staðin fyri at tosa og lurta.
- at ljóðlesa longri og longri orð
- at lesa ókend orð við at brúka sínar royndir, sína vitan og fatan
- at lesa lættar tekstir við hjálp av myndum til tess at kenna innihaldið
- at lesa stuttar setningar við kendum innihaldi uttan at vera bundin at myndum.

Í 4. flokki eigur næmingurin at duga so mikið væl at lesa, at hann sjálvur kann lesa lættar bøkur á móðurmálinum, og næmingurin eigur at duga at skriva stuttar fyrisagnir og sjálvstøðugar søgur.

### Ávegis mál í 6. flokki

Í 6. flokki eigur næmingurin nú at duga so mikið væl at lesa, at hann sjálvur kann lesa torførar bøkur.

Umframt omanfyri nevndu málini eigur næmingurin í 6. flokki at verða førur fyri:

- at leita eftir upplýsingum
- at skilja og tulka tekstir
- at meta um innihaldið í tekstum
- at lesa meira flótandi, hóast enn kunnu vera orð, ið geva trupulleikar
- at finna svar út frá givnum teksti
- at lesa raðið og skilja tað, hann lesur
- at lesa og skilja eina leiðbeining í fleiri punktum, t.d. eina uppskrift
- at finna gleði við at lesa.

## Uppgávur í føroyskum

Landsroyndin í føroyskum í 4. flokki fevndi um eina innantanna lesiroynd, har torleikastøðið øktist líðandi. Skrivligi parturin var ein fyrisøgn. Væntast má, at næmingurin dugir so mikið av mállæru, sum neyðugt er til rættskrivingina á hesum stigi.

Landsroyndin í føroyskum í 6. flokki fevndi um lesing (førleikin at lesa og førleikin at skilja), mállæru og fyrisøgn. Lesiparturin var ein innantanna lesiroynd, har torleikastøðið øktist líðandi. Skrivligi parturin fevndi um eina roynd í mállæru og eina fyrisøgn.

## Royndarúrslit

### *4. flokkur:*

*Talva 1*




Sambært talvu 1 sæst, at næmigarnir í 4. flokki sum heild hava klárað fyrisøgnina væl. Úrslitið vísir, at 63 % av næmingunum liggja í miðal partinum (í 2008 var hesin parturin 37%), og 12 % av næmingunum liggja undir miðal (9% í 2008) og 24% (53% í 2008) liggja í partinum, sum er sera gott.

***Talva 2***




Úrslitið vísir, at 84 % (74 % í 2008) av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir, og 16 % (26 % í 2008) eru niðanfyri miðal. Samanbering eigur tó at gerast við fyrivarni, m.a. tí at uppgávurnar í 2009 hava fleiri tillagingar í mun til 2008 og eru meira krevjandi við fleiri fatanarspurningum.

**6. flokkur:**

***Talva 3***




Sambært talvu 3 sæst, at næmingarnir í 6. flokki sum heild hava klárað fyrisøgnina væl. Úrslitið vísir, at 97 % (94 % í 2008) av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir, meðan bert 3 % (6 % í 2008) av næmingunum liggja undir miðal.

***Talva 4***




Talva 4 vísir, at 93 % (78 % í 2008) av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir, og bert 7 % (22 % í 2008) eru niðanfyri miðal.

***Talva 5***




Talva 5 vísir, at næmingarnir í 6. flokki kláraðu seg væl í málllæruuppgávuni. Góð 90 % (75 % í 2008) av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir, og minni enn 10 % (25 % í 2008) liggja undir miðal.

## Viðmerkingar til føroyskt

Uppgávurnar í føroyskum vóru eins og í 2008 gjørdar soleiðis, at allir næmingar skuldu kunna loysa ein part av uppgávunum – eisini teir veikastu næmingarnir. Tað sýnist, sum at flestu næmingar, bæði í 4. og 6. flokki, megna tann partin av lesingartilgongdini, sum

snýr seg um avkoding. Hetta merkir, at tey megna at umseta skrivaða súmbolið (bókstavir) til ljóð (orð og setningar), og at tey fyri ein part eisini fata tað, tey lesa.

Herumframt eru fleiri torførari uppgávur, har næmingurin fær høvi at vísa bæði fatanarevni og skjótleika. Tað vísir seg, at størsti parturin av næmingunum, nærum 90 %, megnar at lesa aldurssvarandi tekstir við hóskandi skjótleika, samstundis sum tey fáa røttu fatanina av tekstinum. Hesin førleiki mennist frá 4. (83 %) til 6. flokk (94 %). Serliga í 6. flokki tykjast næmingarnir at hava lært seg onkran arbeiðshátt (t.d. tað at strika undir orð og setningar), sum hjálpir teimum at minnast og fata, tá fatanarspurningar koma.

Næmingar í 4. flokki eru fyrst nú byrjaðir at lesa nóg væl til at kunna savna seg um at fata og skilja samstundis, sum at lisið verður. Hóast uppgávurnar at lesa og skilja eru torførari í 2009 enn í 2008, er úrslitið í 2009 betri og javnari enn í 2008. Mett verður, at 2009-úrslitið møguliga vísir eina rættari mynd enn 2008-úrslitið. Tað kann hugsast, at hetta kann hava nakað at gera við beinraknari uppgávur og førleika og vana hjá næmingum, lærarum og foreldrum at vera til roynd.

Eisini i fyrisøgnini kláraðu næmingarnir seg sum heild væl bæði í 4. og í 6. flokki. Næmingarnir í 4. flokki eru somuleiðis væl javnari í fyrisøgn í 2009 enn í 2008.

Úrslitið í mállæru í 6. flokki vísti seg at vera sera gott, har góð 90 % av næmingunum var frá miðal og uppeftir. Hetta er væl betri úrslit enn í 2008, har bert 75 % av næmingunum vóru frá miðal og uppeftir. Her skal sigast, at tíðin til mállæruuppgávuna í 2009 er longd í mun til 2008, tá hon var mett at vera ov stutt og kundi virka ørkymlandi hjá næmingunum. Í mállæruni í 2009 tykjast næmingarnir sum heild at hava lisið og skilt uppgávurnar rætt og lært seg viðkomandi mállærureglur.

Samanumtikið kann sigast, at tað er sera umráðandi framhaldandi at menna lesiførleikan bæði við atliti at tí partinum av lesiførleikanum, sum snýr seg um fatan og við tí partinum, sum snýr seg um at umseta skrivaða súmbolið (bókstavir) til ljóð (orð og setningar). Tað hevur stóran týdning at læra næmingarnar at hava gott arbeiðslag og at menna ávísar arbeiðshættir, ið hjálpa næminginum at hava yvirlit og skipa arbeiðið. Mállæruparturin skal somuleiðis framhaldandi mennast, og serliga eigur størri áherðsla at verða løgd á at læra rættskriving.

Hóast uppgávurnar, serliga at lesa og skilja føroyskt, eru torførari í 2009 enn í 2008, sýnist tað, sum at næmingarnir klára seg betur. Ein orsøk kann vera, at bæði lærarar, næmingar og foreldur hava givið landsroyndini í 2009 gætur, og tilvitanin um krøv og mál er vorðin størri. Royndir geva okkum eitt amboð at fylgja við, meta um og eftirmeta verandi støðu.

# Støddfrøði

Endamálið fyri lærugreinina

Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin fær eina skipaða fatan av umheiminum og av grundleggjandi støddfrøðiligum høpi, so at hann verður førur fyri at sanna, orða og loysa støddfrøðiligar spurningar, og
- at næmingurin fær vitan um støddfrøðilig hugtøk, talfatan og fimi í talviðgerð og gevur honum innlit í grundleggjandi evni og hættir í lærugreinini.

### Ávegis mál í 4. flokki

Tøl og rokning við teljitølum ( N ) : Samløga -Frádráttur – Falding og Sundurbýting (+ , -, · , : ) Skipanarrelatión ( >, < ) Brothugtakið Geometri – Rúmd (sentiterningar), ummál, vídd, spegling, samskapsásar, máting Krossskipan Hagfrøði Líkningar Orða støddfrøðiligar uppgávur Klokkan, álmanakkin Keypa -prísir

### Ávegis mál í 6. flokki

Tøl og rokning við rationellum tølum ( Q ) : Samløga -Frádráttur – Falding, (+ , -, · ), eisini við desimaltølum Sundurbýting ( : ) Rokning við brotum ( + , -, · ) og % Umrokning millum mátieindir: l – dl, m -cm, kg – g Geometri: vídd og rúmd av einføldum skapum Lesa úr talvum Lesa farmynd Linjufunktión í krossskipanin og annars framhald av evnum til 4. flokk.

## Uppgávur í støddfrøði

Uppgávurnar í stødfrøði, bæði í 4. og 6. flokki, vóru gjørdar samsvarandi ávegis málunum, nevnd omanfyri.

# Royndarúrslit í støddfrøði

4. flokkur:

***Talva 6***




Talva 6 og 6a vísa yvirlit yvir øll næmingaúrslitini í 4. flokki í støddfrøði. Fult stigatal er 50 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið er 42 stig (í 2008 var miðalstigatalið 40 stig). Royndarúrslitini í talvu 6 eru umroknað eftir hesum leisti:

| Stig | Úrslit |
|---|---|
| 50 – 48 | Sera gott |
| 47 -40 | Gott |
| 39 -35 | Yvir miðal |
| 34 -25 | Miðal |
| 24 -13 | Undir miðal |
| 12 – 0 | Ikki nøktandi |

***Talva 6a***



***Talva 6b***




Talva 6b vísir svarprosentið fyri alt landið innan ymsu uppgávuevnini í 4. flokki í 2008 og 2009. Á talvuni sæst, at trý nýggj uppgávuevni eru í mun til landsroyndina í 2008.

## 6. flokkur:

***Talva7***




Talva 7 sýnir yvirlit yvir øll næmingaúrslitini í 6. flokki í støddfrøði. Fult stigatal er 100 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið er 75 stig (í 2008 var miðalstigatalið 67 stig). Royndarúrslitini í talvu 7 eru umroknað eftir hesum leisti:

| **Stig** | **Úrslit** |
|---|---|
| 100 – 95 | Sera gott |
| 94 - 80 | Gott |
| 79 - 70 | Yvir miðal |
| 69 - 50 | Miðal |
| 49 - 25 | Undir miðal |
| 24 - 0 | Ikki nøktandi |

***Talva 7a***




Talva 7a vísir yvirlit yvir øll næmingastigabýti í 6. flokki í støddfrøði. Fult stigatal er 100 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið er sum sagt 75 stig (har miðalstigatalið í 2008 var 67 stig).

***Talva 7b***




Talva 7b vísir svarprosentið fyri alt landið innan ymsu uppgávuevnini í 6. flokki í 2008 og 2009. Á talvuni sæst, at tvey nýggj uppgávuevni eru í mun til landsroyndina í 2008.

## Viðmerkingar til støddfrøði

Uppgávurnar í støddfrøði í innihaldi, mongd og sniði líkast uppgávunum í 2008, so hóast tillagingar í uppgávunum, m.a. eru nøkur uppgávuevni komin afturat í 2009, so ber til við ávísum fyrivarni at gera samanberingar millum 2008 og 2009. Tað ber tó ikki so væl til at gera samanberingar millum 4. og 6. flokk, serliga tá 6. flokkur hevur fleiri uppgávur enn 4. flokkur. Hetta sæst eisini aftur í stigabýtinum, har fult stigatal í 4. flokki er 50, og fult stigatal í 6. flokki er 100, sum tí loyvir eini størri differentiering. Samanumtikið kanna annars sigast, at næmingarnir bæði í 4. og 6. flokki hava kláráð landsroyndina stak væl.

*Landsúrslitið hjá 4. flokki í støddfrøði:*

Sambært talvum 6, 6a og 6b sæst, at 4. flokkur kláraði seg væl í landsroyndini. Verður hugt nærri at úrslitunum, sæst, at meira enn 97 % av næmingunum hava eitt urslit, sum er miðal ella oman fyri miðal. Harumframt kann nevnast, at hjá 18 % av næmingunum er úrslitið sera gott (hetta tal var í 2008 11 %), og hjá 54 % av næmingunum er úrslitið gott. Sum áður nevnt, so hava næmingarnir í 4. flokki í miðal fingið 42 (í 2008 var miðalstigatalið 40) av tilsamans 50 stigum.

*Landsúrslitið hjá 6. flokki í støddfrøði:*

Sambært talvum 7, 7a og 7b sæst, at 6. flokkur eisini kláraði seg væl í landsroyndini í støddfrøði, og væl betur enn í 2008. Verður hugt nærri at úrslitunum, sæst, at 92 % (í 2008 var hetta tal 82 %) av næmingunum hava eitt urslit, sum er miðal ella oman fyri miðal. Harumframt kann nevnast, at hjá 8 % (í 2008 var talið 4 %) av næmingunum er úrslitið sera gott, og hjá 38 % av næmingunum er úrslitið gott. Sum áður nevnt, so hava næmingarnir í 6. flokki í miðal fingið 75 stig (í 2008 var miðalstigatalið 67) av tilsamans 100 stigum.

# Náttúra og tøkni

## Endamálið fyri lærugreinina

### Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin við upplivingum og royndum fær innlit í fyribrigdi og samanhang í náttúruni
- at næmingurin fær innlit í, hvussu ymisk tøkni virkar, og lærir at nýta tól og amboð
- at hann víðkar hugsanir, mál og hugtøk, sum hava gerandsligt virði
- at næmingurin við eygleiðingum, kanningum og royndum mennir hegni, skapanarevni og samstarvsevni
- at kveikja gleði næminganna, forvitni og áhugan fyri náttúruni
- at menna áhugan fyri tøkni, lívstreytum og livikorum
- at næmingurin fær almenna vitan í landalæru, lívfrøði og alis-og evnafrøði
- at hjálpa næmingunum at fata samanspælið millum menniskjað og náttúruna úti og heima
- í huga og verki at menna ábyrgdina fyri náttúruni.

### Ávegis mál í 4. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri

- at lýsa fyribrigdi sum ljós, ljóð og rørslu
- at lýsa gerandislig viðurskifti innan tøkni, sum el og magnet
- at greiða frá lufttrýsti
- at greiða frá plantum og dýrum og teirra liviumstøðum
- at greiða frá vatnringrás og vatnnýtslu
- at greiða frá vanligastu fiskasløgunum undir Føroyum og teirra liviumstøðum
- at lýsa nøkur fuglasløg, føði og tilhald
- at greiða frá sansunum
- at duga oyggjarnar í Føroyum, hægstu fjøll og nakrar býir/bygdir
- at kenna norðurlond, høvuðsstaðir og fløgg
- at kenna ættirnar og duga at brúka kumpass
- at greiða frá um sólskipanina og sambandinum millum mánan, jørðina og sólina.

### Ávegis mál í 6. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri at

- lýsa uppruna Føroya
- duga heimspartar, heimshøv og havstreymar
- greiða frá, hvussu náttúruvanlukkur ávirka liviumstøður hjá fólki og dýrum
- greiða frá sólskipanini og seta hana í samband við árstíðir, flóð og fjøru
- lýsa veðurlagsbelti
- kenna høvuðstættirnar í okkara fiskivinnu, veiðireiðskap og skipasløg
- greina liviumstøður hjá plantum og dýrum, vistskipanir og føðiketur
- kenna vanligastu fuglasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu fiskasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu dýrasløgini í Føroyum
- greiða frá høvuðs kropsgøgnum hjá fólki og teirra týdningi
- lýsa, hvussu matur og rørsla ávirka okkum
- greiða frá og duga hugtøk um streymnýtslu, streymkeldur, javnstreym og vendistreym
- lýsa, hvussu tøkni og dálking kunnu ávirka lívskorini hjá plantum, dýrum og menniskjum
- læra og nýta náttúruvísindaligt arbeiðslag við atliti at spurdómum, fyrireika og gera kanningar og samanbera kanningarúrslit
- læra at velja og nýta viðkomandi amboð og tól í kanningararbeiðnum, t.d. stereoluppar og indikatorar
- leggja fram kanningarúrslit og nýta ymiskar framløguhættir, sum grafar, tekstir, fyrilestur og drama.

# Uppgávur í náttúru og tøkni

4. flokkur:

Uppgávurnar í landsroyndini í 4. flokki í mai 2009 fevndu um hesi evni:

1. Magnet
2. El-læra
3. Dýr í fjøruni
4. Smákykt
5. Fuglasløg í Føroyum
6. Norðurlond, høvuðsstaðar, lond og fløgg
7. Oyggjarnar í Føroyum.

6. flokkur

Uppgávurnar í landsroyndini í 6. flokki í mai 2009 fevndu um hesi evni:

1. Ættir
2. Sólskipan
3. Fiskur
4. Plantur
5. Matur
6. Mannakroppur
7. Jarðfrøði.

# Royndarúrslit

4. flokkur:

***Talva 9***




Talva 9 og 9a vísa yvirlit yvir næmingaúrslitini í 4. flokki í náttúru og tøkni. Fult stigatal er 100 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2009 er 80 stig (í 2008 var miðaltalið fyri landið 75 stig). Royndarúrslitini eru umroknað eftir hesum leisti:

| Stig | Úrslit |
|---|---|
| 95 -100 | Sera gott |
| 94 -80 | Gott |
| 79 -70 | Yvir miðal |
| 69 -50 | Miðal |
| 49 -25 | Undir miðal |
| 24 - | Ikki nøktandi |

***Talva 9a***




***Talva 10***




Talva 10 vísir eina samanbering av svarprosentinum fyri alt landið í 4. flokki innan ymsu uppgávuevnini, sum eru eins bæði árini.

6. flokkur:

***Talva 11***




Talva 11 og 11a vísa yvirlit yvir øll næmingaúrslitini í 6. flokki í náttúru og tøkni. Fult stigatal er 100 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2009 er 71 stig (í 2008 var miðaltalið fyri landið 53 stig). Royndarúrslitini eru umroknað eftir hesum leisti:

| **Stig** | **Úrslit** |
|---|---|
| 95 -100 | Sera gott |
| 94 -80 | Gott |
| 79 -70 | Yvir miðal |
| 69 -50 | Miðal |
| 49 -25 | Undir miðal |
| 24 - | Ikki nøktandi |

***Talva 11a***



*Talva 12*




Talva 12 vísir eina samanbering av svarprosentinum fyri alt landið í 6. flokki innan ymsu uppgávuevnini, sum eru eins bæði árini.

## Royndarúrslitini 2008 og 2009 í nátturu og tøkni í 4. og 6. flokki í samanburði

*Talva 13*




Talva 13 vísir eitt yvirlit yvir øll næmingaúrslitini í 4. flokki og 6. flokki í náttúru og tøkni fyri alt landið bæði í 2008 og í 2009.

## Viðmerkingar til náttúru og tøkni

Omanfyri standandi talvur í náttúru og tøkni vísa, at allir næmingarnir bæði í 4. og í 6. flokki sum heild hava klárað uppgávurnar í náttúru og tøkni væl, og enntá munandi betur enn í landsroyndini í 2008.

### Landsúrslitið hjá 4. flokki

Í talvu 9 sæst sjónliga, hvussu væl 4. flokkur hevur klárað landsroyndina í náttúru og tøkni. Heili 97 % av næmingunum hava eitt úrslit, sum er miðal ella oman fyri miðal. Harumframt kann nevnast, at hjá 9 % av næmingunum er úrslitið sera gott, meðan minni enn 6 % av næmingaúrslitunum er undir miðal, og ongin næmingur hevur úrslit, sum ikki er nøktandi. Heili 57 % hava eitt úrslit, sum annaðhvørt er gott ella sera gott. Sum áður nevnt, so hava næmingarnir í 4. flokki í miðal fingið 80 (í 2008 var talið í miðal 75) av tilsamans 100 stigum.

Sambært talvu 10, sum vísir, hvussu næmingarnir hava klárað ymsu uppgávuevnini, sæst, at millum 90 og 100 % av næmingunum hava klárað uppgávuevnini um smákykt og Føroyar, og at millum 80 og 90 % hava klárað uppgávuevnini um Norðurlond, magnet og dýr í fjøruni, og at ávikavist 77 % og 76 % hava klárað hini bæði evnini um fuglar og el-læru. Serliga er tað evnið um magnetir, ið hevur gjørt eitt lop frameftir frá 2008 við 57 % til 2009 við 85 %.

Í 2008 var landsmiðalúrslitið hjá 4. flokki í náttúru og tøkni gott við 75 stigum av 100. Í 2009 er landsmiðalúrslitið enn betri við 80 stigum av 100. Frágreiðingin til góða landsúrslitið hjá 4. flokki í náttúru og tøkni kann m.a. vera, at:

- vitanin um og royndir við at landsroynd í lærugreinini verður við ársenda, kann vera við til at bæði næmingar, lærarar og foreldur eru meira tilvitað um fakliga innihaldið og krøvini í lærugreinini
- spurningarnir í 2009 eru greiðari orðaðir enn í 2008, og tí eru færri misskiljingar
- lesiteksturin til uppgávurnar er stuttur við nógvum myndum
- lærugreinin er nýggj og spennandi.

### Landsúrslitið hjá 6. flokki

Talva 11 vísir, at úrslitið hjá 6. flokki í landsroyndini er munandi betri í 2009 enn í 2008. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2009 er 71 stig, og miðaltalið í 2008 fyri landið var 53 stig. Verður hugt nærri at tølunum, sæst, at 91 % (í 2008 var hetta prosenttal 58) av næmingunum hava eittt úrslit, sum er miðal ella omanfyri miðal. Hini 9% av næmingunum hava eitt úrslit, sum er undir miðal.

Í 2008 var svarprosentið niðanfyri 60 í øllum uppgávuevnunum uttan í *fiskivinnu* og *føðiketu*. Sambært talvu 12 sæst, at hægsta svarprosentið er 98 í uppgávuevninum *matur*

og at lægsta svarprosentið er 61 í uppgávuevninum *plantur*.

Royndirnar í náttúru og tøkni í 6. flokki eru í øllum førum á sama støði sum í 2008, og kanska heldur meira krevjandi. Hóast hetta eru úrslitini góð og munandi betri enn í 2008). Frágreiðingin til góða landsúrslitið hjá 6. flokki kann m.a. vera, at:

- vitanin um og royndir við at landsroynd í lærugreinini verður við ársenda, er við til at gera bæði næmingar, lærarar og foreldur meira tilvitað um innihald og krøv

- uppgávurnar í 2009 eru greiðari orðaðar enn í 2008, og tí eru færri misskiljingar.

Samanumtikið kann allarhelst sigast, at næmingarnir í føroysku skúlunum í lærugreinini náttúru og tøkni duga og klára seg væl.